## HEILSANIR



**Góði fitti Jón Mohr Olsen**
Tillukku við bronsuni í Sjællandskappingini og úttøkuni í danmarksmeistaraskapinum í vresling, ynskja vit øll
**Ommis**



**Góða elskaða Freia**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum, muss og klemm. frá okkum
**Ommis**



**Góða fitta Anna**
Tillukku við 3 ára degnum 26. jan. Muss og klemm frá okkum øllum
**Ommis**



**Góða Freia**
Tillukku við 4 ára degnum eisini ein heilsan til Jón og Jórun, Peder og Karolinu og Oskar. Nógvar mussar.
**Omma og abbi í Hósvík**



**Góði abbi**
Hjartaliga tillukku við degnum, ið var 20. jan. Eg elski teg.
**Heilsan Olivia**


veitst tú ikki tað?
Sosialurin


**Heilsanir** 30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑Leygard.

Tekstur:.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................
.....................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).

Navn: .....................................................................

Bústaður: .....................................................................

Bygd/býur: ................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Sosialurin
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«

# Møtir fyri øll í Havn



*Meinigheitshúsið í Havn er karmur um sína missiónsviku í hesum døgum*

**Eins og vanligt hevur verið í eitt mannaminni, er árliga missiónsvikan í Havn í hesi vikuni. Talar og kór ymsastaðni frá luttaka, og fólk í hópatali savnast undir Guds orð**

MØTIR
*Snorri Brend*

Seinasta vikan í januar mánaði hevur verið føst vika til missiónsvikuna í Havn. Hetta er ein vika við møtum, ið venda sær til øll ættarliðini.

Missiónsvikan, sum verður hildin í Meinigheitshúsinum byrjaði longu sunnudagin kl. 14 við barnamøti og helt síðani fram við møti kl. 18. Síðani hava møtini verið kvøld kl. 8 – og halda fram hvørt kvøld restina vikuni somu tíð.

Hóskvøldið verður eitt serstakt ungdómskvøld, sum tey ungu í meinigheitini skipa fyri. Her koma vanliga rættiliga nógv ungfólk og eldri saman til eitt gott og lætt kvøld.

Runt landið finnast nógvar góðar sangkreftir, og fleiri teirra sleppa eisini framat við eina slíka viku. Í fyrstu syftu verður satsað uppá tey kórini, sum eru í Meinigheitshúsinum, men kórvitjanir eru eisini úr t.d. Toftum og Fuglafirði.

Talarar koma eisini nógvastaðni frá. Í ár hevur ein fingið klaksvíkingin, Hera Elttør sum talara. Hann starvast sum trúboðari m.a. fyri føroyingar í Danmark, men er hesa vikuna boðin til Havnar at tala á missiónsvikuni.

### Gamal siður

Tað hevur altíð verið siður frá Heimamissiónini í Føroyum við slíkum møtirøðum – ella missiónsvikum, sum tær verða kallaðar á mannamunni.

Um heystið verður skráin løgd fyri tann komandi veturin, um nær og hvar tær ymisku missiónsvikurnar liggja. Síðani verður farið undir at fyrireika hesar, at útvega talarar, sangkreftir og ikki minst at biðja fyri hesum møtum.

Hóast siðurin er gamal, so er boðskapurin kortini altíð nýggjur. Møtini ganga fyri seg á sama hátt sum vanligt, við sangi, eini talu og síðani vitnisburðum frá fólki. Alt miðar eftir at menniskju skulu hoyra Orðið og verða frelst.

Mong eru eisini tey, sum eftir eina slíka viku fingu at sanna, at tey vórðu frelst.


Sosialurin
www.sosialurin.fo